

**NEVND**

*- Full semja er í nevndini um, at vit taka ikki undir við nettosáttmála, og eg vænti ikki, at fiskimenn taka undir við hesum heldur, segði Jan Højgaard á landsfundinum týsdagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# kemur

**» ... tá vit noktaðu at taka undir við nettosáttmála, ringdi reiðarafelagið eftir semingsmanninum. Enn hevur eingin seming verið...**

JAN HØJGAARD

hava nettosáttmálar, og at býtisprosentini skulu lækka.

- Vit roknaðu upp avleiðingarnar av teirra krøvum, og í einstøkum førum hevði talan verið um heili 54% í niðurskurði hjá summum skipabólkum, legði hann aftrat.

### Eingin nettosáttmáli

Føroya Fiskimannafelag vísir kravinum um nettosáttmála staðiliga frá sær.

- Full semja er um hetta í nevndini, og eg vænti ikki, at fiskimenn taka undir við hesum heldur.

Tá FF noktaði blankt at taka undir við kravinum um nettosáttmála, gjørdi reiðarafelagið av at ringja eftir semingsmanninum.

- Enn hevur eingin seming verið, og eingin hevur lýst verkfall ella verkbann. Hvat fer at henda við sáttmálanum, veit eg ikki í løtuni.

Hann legði aftrat, at nú eingin almenn inntøkutrygd verður, fer hýran hjá sjófólki at minka.

- Nú skulu vit sjálvir rinda fyri inntøkutrygdina, segði Jan Højgaard, felagsformaður.

*vilmund@sosialurin.fo*



**INNTØKUTRYGD**

*Inntøkutrygd fiskimanna verður frá 1. januar 2011 ikki longur ein almenn skipan, men ein skipan, sum fiskimenn og reiðarar sjálvir noyðast at gjalda*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Noyðast nú at rinda sína egnu inntøkutrygd

**LANDSFUNDUR – Inntøkurnar hjá fiskimonnum verða minni í 2011, nú vinnan sjálv noyðist at rinda inntøkutrygdina. Hvussu nógv minni inntøkan verður, veldst um býtisprosentið, og hvussu hýrurnar annars verða í komandi ári**

Vilmund Jacobsen

Í síni ársfrágreiðing ásannar felagsformaðurin, Jan Højgaard, at inntøkurnar hjá fiskimonnum verða minni í 2011, nú inntøkutrygdin frá at vera ein almenn skipan nú verður løgd út til vinnuna frá 1. januar 2011 at rokna.

At inntøkutrygdin er ein almenn skipan, sum hon hevur verið í so mong ár, verður nú søga.

Á landsfundinum týsdagin greiddi Jan Højgaard frá, at ein arbeiðsbólkur í hálvt annað ár hevur arbeitt við, at reiðarar og fiskimenn sjálvir taka á seg ábyrgdina at veita fiskimonnum eina inntøkutrygd.

- Hetta arbeiði hevur verið drúgt og hart. Nógvir kamelar eru svølgdir, ásannaði formaðurin.

Jan Højgaard ásannaði eisini, at inntøkutrygdin, soleiðis, sum vit hava kent hana gjøgnum øll hesi mongu ár, nú verður burtur.

### Minkandi inntøkur

Felagsformaðurin segði, at øll feløgini í Samtaki hava heitt á løgtingið um at seta so mikið av í grunnin, sum er skipaður, at hann ikki verður tómur eftir stuttari tíð.

- Vit hava eisini gjørt vart við hetta í arbeiðsbólkinum, í viðmerkingum til uppskotið um trygdargrunn – og í vinnunevndini. Men tíverri er ikki líkt til, at hetta hevur havt stórvegis ávirkan.

Á landsfundinum staðfesti Jan Højgaard, at inntøkurnar hjá fiskimonnum verða minni í 2011, nú ein partur av hýruni fer í trygdargrunnin.

- Hvussu nógv minni hýrurnar verða, veldst um býtisprosentið, og hvussu hýran annars verður, segði felagsformaðurin.

*vilmund@sosialurin.fo*